UTTAN ÚR HEIMI

# Ætlað sjálvmorð kostaði ellivu mannalív



*Tokið, sum rendi á bilin hjá Juan Manuel Alvarez, koyrdi við 90 kilometra ferð*
*Mynd: Reuters*

Amerikanarin Juan Manuel Alvarez ætlaði at taka lívið sær. Hann setti seg í bilin og sett hann á jarnbreytina. Men so slepti hann ætlanini

**TOKVANLUKKA**
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tann 25 ára gamli Juan Manuel Alvarez sat í bilinum á jarnbreytini nærhendis Glensdale uttan fyri Los Angeles og bíðaði eftir, at eitt tok skuldi koma. Men tá rokið kom, sveik dirvið. Í síðstu løtu leyp hann úr bilinum.

Stoyturin var ógvusligur, tá tokið úr Los Angeles rendi á bilin. Ein av vognunum bleiv slongdur av breytini og yvir á eina aðra breyt, har hann rakti ein annan vogn. Tá bjargingarliðið og løgreglan komu á staðið, vóru ellivu fólk deyð, og meiri enn 125 máttu flytast á sjúkrahús. 60 onnur máttu fáa sálarliga hjálp.

Sambært myndugleikunum er hetta tann ringasta tokvanlukkan í Kalifornia í trettan ár. Men spurningurin er, um talan var um eina vanlukku. Juan Manuel Alvarez bleiv tikin beint aftan á tilburðin, og ákæruvaldið í Los Angeles segði í gjár, at nú skal støða takast til, um hann skal skuldsetast fyri morð.

Juan Manuel Alvarez hevur viðgingið, at hann setti bilin á jarnbreytina, tí hann ætlaði at beina fyri sær. Tað gjørdi hann ikki, men nú kann hann vænta at enda sum drápsmaður ístaðin fyri.

# Kvinnur í menningarlondum fáa færri børn nú enn fyrr

Fyri fyrstu ferð í søguni fáa kvinnurnar í menningarlondunum færri enn trý børn í meðal

**BØRN**
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í mong ár hava vísindafólk stúrt fyri, at fólkatalið í heiminum og serstakliga menningarlondunum fór at veksa nógv við tí úrsliti, at tað kundi gerast trupult at breyðføða øll. Men nú vísir ein nýggj kanning, at har er einki at stúra fyri.

Kanningin umfatar 192 menningarlond, og hon vísir, at nú fáa kvinnurnar í menningarlondunum bara 2,9 børn í meðal, og tað er minni enn nakrantíð fyrr. Um orsøkina sigur kanningin, at fólk bíða longri við at gifta seg og at fáa børn. Tølini vísa, at bólkurin av ógiftum kvinnum í aldrinum 25 til 29 ár er vaksin úr 15 prosentum í sjeytiárunum upp í 24 prosent. Hjá monnum er sami bólkur vaksin úr 33 í heili 44 prosent.

Ein onur orsøk er, at fyribyrging munandi vanligari nú enn fyrr. Í kanningini sæst, at talið á kvinnum, sum brúka okkurt fyribyrgjandi, er vaksið 38 prosent seinastu tjúgu árini. Hjá monnum er vøksturin 52 prosent.

## Heimsins norðasta oljuleið

Norski boripallurin "Eirik Raude" er í ferð við at leita eftir olju á einari leið stutt sunnan fyri Bjarnoynna. Norsk Hydro, sum stendur fyri leitingini, hevur góðar vónir um at finna olju á leiðini. Eydnast tað, er hetta heimsins norðasta oljuleið, skrivar Aftenposten.

"Eirik Raude" skal bora tríggjar brunnar í Barentshavinum í vetur. Teir báðar seinnu skal hann bora fyri Statoil. Boringarnar hava sera stóran áhuga í oljuvinnuni. Bæði Norsk Hydro og Statoil hava góðar vónir um at finna nógva olju í økinum, og roknað verður við, at fleiri altjóða feløg fara at liggja framvið, tá norsku myndugleikarnir fara at útluta fleiri leitingarloyvi í Barentshavinum næsta ár.

Í 1980 loyvdu myndugleikarnir teimum fyrstu boringunum í Barentshavinum, men hóast 60 brunnar eru boraðir síðani, hava feløgini bara funnið eina leið, sum er burðardygg. Tað er Snøhvit-leiðin, sum verður útbygd í løtuni.

## Kenna seg hava ábyrgd

Ein kanning í týska blaðnum Stern vísir, at meiri enn 20 prosent av týska fólkinum kenna seg hava ábyrgd av tí, sum hendi í teimum nazistisku týningarlegunum undir seinna heimsbardaga. 74 prosent svaraðu nei.

Gerhard Schrøder, kanslari, segði í einari røðu í gomlu týningarleguni Auschwitz mikudagin, at nógv teir flestu týskararnir, sum eru á lívi í dag, hava ikki skyldina av tí, sum nazistarnir gjørdu, men at teir kortini hava eina serliga ábyrgd.

Mikudagin varð skipað fyri minningarhaldi í Auschwitz í sambandi við, at 60 ár eru liðin, síðani sovjetski herurin fríaði teir fangarnar, sum vóru eftir á lívi har. Hildið verður, at næstan hálv onnur millión fólk vórðu týnd í leguni. Nógv tey flestu vóru jødar, og kanningin hjá Stern vísir, at 47 prosent av týska fólkinum halda seg hava eina ávísa skyldu mótvegis jødum.

## Fiskimenn fáa bátar

Í Noregi hava menn havt ætlanir um at senda fleiri fiskibátar til Suðurasia, har fiskimenn mistu fleiri túsund bátar í flóðalduni annan jóladag.

Longu beint aftan á flóðalduna kom eitt uppskot um at senda teimum bátleysu fiskimonnunum fiskifør, sum liggja ymsastaðni í Noregi, og sum kortini skulu høggjast upp. Men seinni hevur tað víst seg, at í veruleikanum hava norðmenn bara tríggjar bátar, sum eru egnaðir til endamálið. Teir eru ikki sendir avstað, tí tað er ikki fíggjarliga ráðiligt at senda tríggjar smáar fiskibátar so langan veg, skrivar Dagsavisen. Tí hava tey, sum standa fyri ætlanini, gjørt av at bíða, til fleiri bátar verða lagdir.

Fiskimálaráðharrarnir í ES-londunum samdust týsdagin um at lata fiskimonnunum í Suðurasia bátar, sum verða lagdir, tí teir skulu høggjast upp. Talan verður bara um bátar, sum kunnu brúkast í økinum, og enn veit eingin, hvussu nógvar bátar talan kann verða um.

## Fox er ein trupulleiki

Ted Turner, sum stovnaði sjónvarpið CNN, heldur lítið um kappingarneytan Fox News. Í einari røðu herfyri segði Turner, at Fox News er ein hóttan ímótii demokratiinum.

- Tað er í lagi, at Fox News stýðjaði George W. Bush upp undir valið í november, men tá slíkt verður gjørt við at reingja sannleikan ella í frægasta lagi við at snara sannleikanum, so er tað ein trupulleiki, segði Turner í einari røðu nú um dagarnar. Hann fór enntá so langt sum at samanbera leiklutin hjá Fox News við tað, sum týska sjónvarpið gjørdi fyri Adolf Hitler.

Leiðslan í Fox News letur ikki atfinningarnar við seg koma. Hon heldur, at orðini hjá Ted Turner eru ikki annað enn eitt illsinnisgleps frá einum taparа og sipar til, at í dag hevur Fox News fleiri hyggjarar í USA enn CNN. Ted Turner eigur ikki CNN longur. Í 1996 keypti Time Warner sjónvarpsstøðina.